# Við brævi og brosi



**Ert tú postmaður, lættur upp á sporið og av lyndi, kemur tú í samband við nógv fólk. Hetta heldur Hallstein Sigurðsson vera eina orsøk til at verða verandi í starvi sum avgreiðslupostmaður í Kvívík og Kollafirði**

ARBEIÐSDAGUR. Hallstein Sigurðsson ætlaði ikki, at starvið sum postmaður skuldi gerast eitt lívsstarv. Men nítjan árini í Postverki Føroya benda á, at hann fór skeivur. Lesið um arbeiðsdagin hjá einum sjáldsomum bygdapostmanni, sum tekur brosandi móti tí, ið lívið hevur at bjóða

*Orð: Høgni Mohr*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

- Nú. Hetta er annað lívið. At fara upp tá ið proletararnir fara til verka, ha..?

Hallstein Sigurðsson, avgreiðslupostmaður í Kollafirði og Kvívík er í framúr góðum skørum hendan fagra summarmorgunin í mei, ið Sosialurin er farin við honum til arbeiðis. Klokkan er 6.40, tá ið vit fara frá húsum í Havn. Fyrsta sigarettin hongur longu í munnklovanum og sólbrillurnar sita sum stoyptar fyri eyguni.

Hallstein hevur heldur ikki gloymt fartelefonina, men hann iðrar seg um, at hann ikki er í slipsi.

- Tað hevði dámað Bergi betur, nú mann skal í bløðini, heldur hann fyri, sipandi til postverksstjóran, Berg í Garði.

**Bóndasamfelag við lít**

Tað var ongantíð ætlanini, at Hallstein skuldi verða postmaður. Hann ætlaði sær ganga í *eitt* ár. Higartil hevur hann verið postmaður í nítjan ár. Og nógv er broytt hesi mongu árini.

- Tað *var* eitt gott arbeiði, men nú er trýstið vorðið nógv størri. Hetta er ikki longur nakað lívsstarv, staðfestir Hallstein, beint áðrenn vit fara inn í skýmliga bergholið í Kaldbaksbotni.

Hallstein Sigurðsson er klaksvíkingur, sum býr í Havn og arbeiðir í Kollafirði og Kvívík. Sambært hann er hetta annað lívið enn at arbeiða og ganga við posti í Havn, sum hann gjørdi í seytjan ár.

- Tað eru bert tjúgu minuttir millum Havnina og Kollafjørð. Men munurin er stórur. Kollafjørður er eitt bóndasamfelag av einari aðrari verð. Tað er sum at vera á einari aðrari gongustjørnu!

**Neyðug gøtunøvn**

Tað var ikki tað bera spæl hjá einum býarpostmanni at koma til Kollafjarðar. Tað fyrsta, Hallstein noyddist at læra seg, var nøvnini á kollfirðingunum. Har brúkti eingin gøtunøvn og nummur. Við tógvið stríð eydnaðist tað Hallsteini at venja kollfirðingar at nýta gøtunøvnini, sum eru í bygdini. Hóast hann varð klagaður fyri at senda brøv við ófullfíggjaðum bústaði aftur til sendaran, helt hann fast við strongu upplæringina. Kollfirðingar lærdu so dánt, at teir ikki bara búgva í Kollafirði, men eisini í Steinsgøtu ella á Heygavegi.

- Vilt tú vera postmaður, er eitt av grundleggjandi krøvunum, at mann dugir at lesa. Og eitt krav til teirra, sum senda brøv, er, at okkurt er hjá okkum at lesa á brævbjálvanum, heldur Hallstein.

**Drúgvur dagur**

Klokkan er sjey, tá ið vit koyra oman í posthústúnið við Sjógv í Kollafirði. Arbeiðsdagurin er byrjaður, tá ið handbremsan er hálað upp.

Fyrsta uppgávan er at koyra nýbakað breyð av posthúsinum og út í Handilin á Kjalnesi. Roykurin stendur úr flógvu breyðunum og vatnið rennur úr tonnunum á svanga postmanninum, ið bara fekk ein beran temunn áðrenn hann fór heimanífrá í morgun.

Hann festir sær aftur í. Hann veit longu, at dagurin verður drúgvur. Í dag eru lýsingarbløð, sum skulu í hvørt hús. Pensiónirnar eru komnar og skulu gjaldast teimum eldru frammi í Dal og á Signabø í hondina. Hundraðogníggjogfýrst hús bíða eftir Hallsteini.

Afturkomin á posthúsið, eftir at hann hevur verið við breyðnum, uppdagar hann, at ein rúgva liggur eftir. Ein túr afturat í Handilin á Kjalnesi við høsnarungum og øðrum matvørum.

- Huff, gott nokk eri eg raskur, men máti skal vera við. Nei, mann kemur ikki sovandi gjøgnum lívið, sigur hann turrisliga áðrenn hann klamsar hurðina á postbilinum aftur og drønar avstað. Út í Kjalnesbúðina fyri aðru ferð.



**Stór rúgva**

Løtu seinni er tíðin komin at sortera postin. Hann hevur umdømið 1 í Kollafirði. Heilt fitt av brøvum eru. Bóndasamfelagið fornoktar seg ikki; ein rúgva av brøvum er frá MBM. Kollfirðingar skulu nú rinda rokningina fyri eplavelting og taðing. Eisini er blaðið, Samvirke, komið. Tað vigar væl í rúgvuni. Dimmalættingar og Sosialar við feskum tíðindum um skotini í Klaksvík liggja eisini og bíða. Her er nógv at tríva í.

Meðan brøvini flúgva inn í sorteringshillarnar, spyrja vit Hallstein, um hann væntar at missa starvið, nú postverkið skal gerast tíðarhóskandi og burðardygt.

- Nei, tíverri. Man skuldi verið postmaður í Klaksvík, so kundi mann søkt um krígspensión, mutlar hann fyri seg sjálvan.

Telefonin ringir. Tað eru aftur tey í hasari vælsignaðu Kjalnesbúðin. Tey hava onki fars fingið. Hallstein festir sær í aftur eina Prince Light, sum hann beinanvegin pumpar hálva.

**Kollfirðingar bíða**

Tá ið rúgvan av brøvum, pakkum og bløðum er skipað av einslistum, og tær 50 - 60.000 pensiónskrónurnar eru lagdar í taskuna, er klárt at fara avstað í Suzuki jeppinum. Klokkan er nú tjúgu minuttir yvir átta. Vit strúka fram við kollfirðingunum á Signabø og frammi í Dal. Teir mugu bíða eftir bløðum og pensión, tí fyrst gongur leiðin til Kvívíkar. Soleiðis hevur ikki verið fyrr. Tá var ein postkona í Kvívík, men hon flutti til Havnar. Síðani varð økið hjá Hallsteini forskotið, so at hann skuldi ganga innasta part av Kollafirði og Kvívík.

**Arbeiðir upp á Joan**

Við Leynará ringir telefonin. Tað er Joan úr Leynum. Hon gongur við posti í Leynum og passar posthúsið í Kvívík. Fimm minuttir seinni standa vit í túninum við posthús nummar 29 - tað í Kvívík. Joan skyggir sum sólin á skýleysum himli. Hallstein veit longu, at maður Joan kemur heim av fjarleiðum í ovurmorgin, og at hetta er orsøkin til góða lagið.

- Ja, tá verður lív, arrrrhhh, sigur Joan stórlæðandi.

Hallstein biðjur hana koma at fáa sær ein kaffimunn, men Joan sigur seg ikki hava tíð.

- Tað nyttar onki at grenja um, at mann hevur drukkið for lítið kaffi, tá mann *er* komin í himmiríkið, hugleiðir Hallstein aftur ímóti noktandi svarinum frá Joan.

Kaffimunnurin er stuttur, og meðan drukkið verður, skundar Hallstein sær at arga Joan so nógv sum gjørligt við longsuli hennara eftir manninum. Joan fær næstan ikki drukkið glóðheita kaffið, sum hon flennir. Og tað er ikki bara tí Hallstein er stuttligur. Sólin skínur, tjøldrini láta og maðurin er á heimleið. Skal hon ikki vera glað?

**Fólk eru ymisk**

Meðan posturin í Kvívík verður skildur, kemur eitt løgið bræv á borðið. Bústaðurin er Lindenweg 6, FR-47546 Kvivik. Hallstein ristir við høvdinum, tveitir brævið til viks og savnar seg um at skipa Forældre og Børn, Politikken, Dimmu og Sosialin í rætta røð. Hann prátar alla tíðina og er sera beinrakin í sínum niðurstøðum. Líkist mest einum sjarmerandi skálki.

- Bygdafólkini eru bara fitt. Men eg kundi sum aðrir postmenn hugsað mær, at tey høvdu betur skil á hundunum. Ein kona í Havn segði, at ístaðin fyri at skjóta hundarnar, skuldi mann hugsa um fólkini, sum ikki duga at venja teir!

**Troyttur av Elisi**

Klokkan er farin av tíggju, tá ið vit fara undir at býta postin út í Kvívík. Hallstein hevur ilt í tjúkkanum. Hann varð raktur av tægrasliti herfyri, og tí koyrir hann millum býlingarnar í Kvívík. Annars plagdi hann at ganga sum mest.

Fyrsta húskið, sum fær post hendan morgunin, er tað hjá Johan og Dinnu Thomassen. Skjótt gongur at koyra og ganga millum skotini í Kvívík. Postur verður stungin í postkassar, inn um opnar hurðar og gjøgnum gluggaop.

Ímeðan Hallstein støkkur út og inn úr bláa jeppinum sussar Elis Poulsen í Útvarpinum við sínum óbendiliga bjartskygni. Tá ið Elis prátar við eina vágakonu um fýrs

*Framhald á næstu síðu*

**Tað gongur við fúkandi ferð, tá ið Hallstein skilir brøvini. Tá ið brøvini eru býtt sundur í ymiskar býlingar, verða tey øll løgd í ta røð, sum hann gongur gjøgnum økið**



**- Kollafjørður er eitt bóndasamfelag av einari aðrari verð, heldur postmaðurin, sum sjálvur er ættaður úr Klaksvík**



**Joan Johansen, postkona í Leynum og Hallstein hittast í Kvívík. Hallstein hevur hug at arga Joan, tí henni longist so illa eftir manninum, sum siglur úti. Joan bara flennir...**





**Farið verður stytstu leið í Kvívík. Flákrandi hand- og undirklæðini gevur Hallstein sær ikki far um, tá ið postkassin er í eygsjón**



**Jákup Joensen, vanliga nevndur, Lago, situr og bíðar innan fyri køksgluggan í Kvívík. Hann er prátingarsamur, og Hallstein prátar við hann hvønn dag**